

Stjórin í MEST/PAM, Mouritz Mohr og Magnus Rasmussen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu fegnast um, at tað gekk so væl í hond at fremja stóru uppgávuna at umvæla West Hercules. Mynd Jan Müller

# Tóku lógvatak saman og megnaðu tað “ómøguliga”

Deil:



**Jan Müller**

14.11.2014 - 16:28

Oljan.fo

Tað man vera eindømi í føroyskari søgu, at tað hevur gingið so væl at fáa eina altjóða verkætlan at ganga upp í eina hægri eind og eydnast so væl, sum tá ein av heimsins størstu boripallum setti kós móti Skálafjørðinum og varð umvældur har í góðan mánað. Hetta var einki minni enn eitt sætt bragd og dømi um, hvussu kann gangast, tá samstarv, vilji og gott handverk millum vinna og myndugleikar ganga hond í hond.

West Hercules verkætlanin varð eyðkend av, at hon kom í lag í einum góðum samstarvi millum føroyskan veitara og føroysku leiðsluna í útlendskum oljufelag við sæti í Føroyum og ein framburðssinnaðan og vælviljandi myndugleika á Skálafjørðinum.

At fáa boripallin West Hercules inn til Føroya at verða umvældan gjørdist ein sólskinssøga, og tíðin fer at vísa, um henda hending fer at leggja botn fyri aðrar líknandi hendingar í framtíðini.

Oljan.fo fylgdi arbeiðinum frá byrjan til enda, og nú nakað er fráliðið, síðani pallurin fór víðari til Nýfundlands at bora fyri Statoil, hava vit fingið orð á stjóran á MEST/PAM, Mouritz Mohr, ið sum vera man hevur ilt við at krógva ovfarakæti sítt yvir hesa óvanligu hending.

**Mest spennandi uppgávan**

"Hetta hevur tann mest spennandi uppgávan eg havi verið við til tey meira enn 25 árini á Skipasmiðjuni."

Og Mouritz Mohr dylur ikki fyri, at hvør tann einasti dagur og nátt við í sambandi við uppgávuna hava verið millum tær bestu løturnar í arbeiðslívi hansara.

"Tað hevur verið ein fragd at arbeiða við hesi uppgávuni, tí øll hava verið so glað um at vera partur av henni. Arbeiðsfólkini, uttan undantak, hava gingið inn fyri uppgávuni meira enn 100%. Tú merkti á teimum, at hetta var nakað tey høvdu ynskt og sæð fram til og sum tey tí eisini vildu gera alt fyri at gjøgnumføra."

Hjá PAM, sum varð høvuðsveitari, mundu vera eini 80 fólk knýtt at arbeiðinum, og tilsamans við Mest hava tey verið meira enn 100. Aftrat teimum komu so hálvthundrað onnur, sum hava tikið sær av alskyns uppgávum í sambandi við flutning, eftirlit, matstovu- og gistingarhúsvirksemi oø.

Ta tíðina pallurin var á fjørðinum vórðu meira enn 600 persónar skrásettir at hava verið umborð á pallinum. Aftrat mongu føroyingunum var so eisini manningin og aðrir undirveitarar.

Arbeiðsuppgávurnar vóru nógvar og fjølbroyttar. Kundarnir vóru tveir. Frá 19. august og fram til 29. august var arbeitt fyri North Atlantic Drilling, og tað arbeiðið fevndi m.a. um at skifta tvær at stóru skrúvunum. Eftir 29. august varð arbeitt fyri Seadrill Canada.

Myndugleikarnir í Kanada, har boripallurin nú borar fyri Statoil, seta ymisk krøv, sum ikki eru galdandi í Noregi. Og tað vóru hesi krøvini, sum Pammararnir og Mestmenninir skuldu avgreiða. M.a. varð nýggj sprinklaraútgerð sett upp og vórðu sprinklarar monteraðir í øll manningarrúmini. Nýggjur elevatorur varð settur upp. Nógvar smærri uppgávur vóru so sum at seta gelendarar upp. Haraftrat fingu føroysku handverkararnir til uppgávu at seta upp eina sokallaða OBM Cutting skipan. Henda skal brúkast í sambandi við "mud" og annað tilfar, sum kemur upp úr undirgrundini, tá borað verður. Í Noregi er ikki loyvt at

koyra nakað av hesum tilfarinum á sjógv aftur, men í Kanada loyva tey avmarkaðum men reinsaðum nøgdum at fara á sjógv. Til hetta endamál vórðu sett upp rør á pallbeininum.

Eisini var stálarbeiði gjørt á sjálvari pontongini undir pallinum.

**Til eitt ug**

Samanumtikið nógvar ymiskar uppgávur, sum føroyingar megnaðu til eitt ug. "Okkara fólk hava fingið nógv rós fyri sítt arbeiði, og vit eru eisini errin av, at eingin skaði er hendur, nakað, sum telur sera nógv í hesi vinnuni. Vit høvdu ikki so frægt sum eina bláa negl", sigur Mouritz Mohr.

Hóast flestu arbeiðini vórðu liðug, tá pallurin setti kós móti Kanada síðst í september mánað, fóru kortini 17 fólk frá PAM við pallinum til Kanada. Á ferðini hava tey so m.a. arbeitt við umrøddu OBM skipanini.

Mouritz Mohr, sum fyrstu ferð kom at arbeiða á Skipasmiðjuni í 1980 og gjørdist stjóri á Mest í 2010, dylur ikki fyri, at henda seinasta uppgávan við West Hercules, umframt at vera tann mest spennandi yvirhøvur, eisini hevur verið ein stór avbjóðing.

"Pápi spurdi meg, tá alt hetta kom í lag, um eg svav væl um náttina. Og eg svaraði, at tað gjørdi eg. Og orsøkin var m.a. tann, at loksins varð tað eydnast okkum at fáa eitt stórt umvælingararbeiði heim til Føroya, soleiðis at vit ikki bara skuldu dúva uppá at senda fólk okkara av landinum at arbeiða í oljuvinnuni."

Skipasmiðjustjórin er púra sannførdur um, at høvdu teir ikki havt fólk í arbeiði í hesi vinnu í Noregi, so høvdu teir heldur ikki megnað hesa uppgávuna í Føroyum. Tað er nevniliga m.a. teimum dugnaligu Pammarunum við drúgvum royndum í norsku oljuvinnuni, fyri at takka, at hetta eydnaðist so væl.

Hann vísir á, at teir tóku heim nógvar av formonnunum, sum eru vanir at standa fyri slíkum arbeiði og sum kenna alt til mannagongdir, arbeiðsloyvi, trygd og skjalagongd. Alt nakað, sum krevur nógv av fólkinum.

Alt hetta gekk upp í eina hægri eind. Ja í bakspeglinum ber til at siga, at PAM fekk í bæði posa og sekk, tá hugsað verður um, at fyritøkan í dag kann vísa á, at hon er ment til at arbeiða bæði heima sum úti.

"Vit hava prógvað, at vit kunnu arbeiða í útlandinum eins og her heima fyri ta stóru oljuvinnuna."

**100 mió. kr**

Ikki er lætt heilt neyvt at gera upp í pengum, hvat West Hercules hevur givið av umsetningi til føroyska samfelagið. Men síggja vit burtur frá sjálvum boringunum, sum vóru nakað heilt fyri seg og mundu skapa hundraðtals mió. kr. í inntøkum til Føroyar, so er ikki heilt við víðuna av at gita, at umvælingin á Skálafjørðingum hevur kanska lagt eftir seg einar 100 mió. kr.

Her skulu vit ikki gloyma, at umframt øll arbeiðsfólkini, sum hava verið beinleiðis knýtt at arbeiðinum umborð og á verkstøðum í Havn, Runavík og á Skála, so hevur verið nógv annað arbeiði á landi. Ansni hevur staðið fyri eftirlitinum, Silja Star hevur siglt millum pall og land, oljuútgerðarhavnin hevur staðið fyri fleiri uppgávum sum umboð fyri bæði pall og hotelskip, Sjócafeiin hevur riggað mat til, hotellið og privat hús hava latið dyrnar upp, har hevur verið eitt hav av bussum, sum hava flutt fólk millum flogvøll og Runavík og soleiðis kundi verið hildið fram. Aftrat hesum koma mongu flogferðirnar hjá Atlantsflogi og hevur Vága Floghavn eisini merkt stóra virksemið, tí ikki færri enn 9 stór farmaflogfør vóru við útgerð. Og skulu vit heldur ikki gloyma Sjóborgina hjá Skansi Offshore, sum eisini hevur verið partur av allari uppgávuni.

Sendur tað upp til stjóran í PAM, so verður West Hercules ikki seinasta palluppgávan í Føroyum. "Nú fara vit at hyggja rundan um okkum og eisini kunna um, hvat vit megna í Føroyum. Ein av norsku oljustjórunum, sum fylgdi arbeiðinum, helt fyri, at um vit fóru at hava aðrar møguleikar at umvæla pallar, so var mátin vit høvdu framt hesa uppgávuna uppá og ikki minst hugburðurin avgjørt til okkara fyrimun."

Og tað sigur kanska heldur ikki so lítið, at allir pallar skulu klassast sohvørt, antin 5. ella 10. hvørt ár, so her er nokk at tríva í hjá føroyskum handverkarum eisini.

PAM stjórin vil fegin takka Statoil og her ikki minst føroyska stjóranum fyri, at tað kundi lata seg gera at fáa ein av heimsins størstu oljupallum til Føroya at blíva umvældan.

**Runavíkin tilreiðar**

Og í Runavík er ovfarakætið eftir søguliga umvælingararbeiðið á fjørðinu ikki minni. Har fegnast íbúgvararnir við borgarstjóranum, Magnus Rasmussen, havnastjóranum Tórbjørn Jacobsen og oljuhavnastjóranum Eli Lassen á odda, um, at tað eydnaðist at fáa ein boripall inn á fjørðin. Hetta var sum at síggja ein ynskidreym ganga út sum Magnus Rasmussen, borgarstjóri málbar seg í samrøðu við Oljuportalin.

Hann sigur, at tey nú fara at umrøða alla tilgongdina og vita, hvat ber til at læra av henni, soleiðis at tað eisini í framtíðini fer at bera til at fáa oljupallar inn á fjørðin. Og tað er greitt, at tað skulu gerast ymsar ábøtur og íløgur fyri at gera tað enn meira attraktivt fyri altjóða oljuvinnuna at leggja sær leiðina inn á Skálafjørðin.

"Eru umstøðurnar optimalar og kostnaðarstøðið tað rætta, so eigur einki at vera til hindurs fyri, at oljupallar eisini í framtíðini verða umvældir á fjørðinum, tí vit eiga fólkini til eina slíka uppgávu, " sigur Magnus Rasmussen, borgarstjóri.









Energy
Birth of a
new oilco



PAM
PAM


PAM








MEKANIK

